# Kórleiðarar høvdu konsert



*11 kórleiðarar umframt røddir frá Kamarkórinum og Havnarkórinum høvdu um vikuskiftið konsert í Kommunuskúlanum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Kórsamband Føroya hevði um vikuskiftið fimta skeiðið í eini røð av skeiðum, sum Kórsambandið hevur skipað fyri. Skeiðini eru løgd til rættis av Kórsambandinum, og er endamálið at stimbra føroyskan kórsang og styrkja sambandið millum kórleiðarar í Føroyum**

KÓRSANGUR
*Ingrid Bjarnastein*

Av tí, at játtanin til kórsambandið ikki hevur verið so stór, hevur ikki verið møguligt at skipa fyri so nógvum tiltøkum. Tað, sum kórsambandið fyrst og fremst hevur tikið sær av er árliga kórstevnan, og síðani eisini kórsangurin á ólavsøku. Játtanin hevur ikki rokkið til meira, men tá kórið í fjør fekk játtað meira pening, varð avgjørt at skipa fyri skeiðum fyri kórleiðarum, til tess at menna førleika teirra í kórleiðslu.

Í hesum sambandi hevur Kórsamband Føroya fingið Mogens Dahl til Føroya at undirvísa í kórleiðarunum í Føroyum. Mogens Dahl er rektari á universitetinum í Ålborg, har hann undirvísir í kórleiðslu, og harumframt er hann eisini dagligur leiðari fyri operakórið í Århus, har hann eisini umsitur orkesturleiðslu. Danski rektarin hevur verið við til tey fimm skeiðini kórsambandið hevur skipað fyri, og røðin av skeiðum endar í fyrst í majmánaða. Tá er ætlanin, at teir kórleiðarar, ið hava hug, kunnu fara upp til eina roynd, og harvið fáa skjal uppá, hvat teir duga. Endamálið við skeiðunum er at leggja lag á kórleiðararnar og læra teir at dirigera.

Sum ein endi á hesum eina skeiðnum var skipað fyri konsert í Kommunuskúlanum um vikuskiftið. Har vóru teir 11 kórleiðararnir umframt kvinnurøddir frá Tórshavnar Kamarkóri og Havnarkórinum á pallinum og framførdu nakrar sangir.

## Framtíðin

Hvat Kórsamband Føroya fer at skipa fyri í næstu framtíð er ilt at siga.

– Tað veldst um játtanina, sigur Ólavur Hátún. – Kórsambandið hevur millum annað ætlanir um at gera eitt kórnótabókasavn í samstarvi við Landsmiðstøðina í undirvísingartólum. Her er ætlanin, at Landsmiðstøðin skal umsita bókasavnið, meðan Kórsambandið fær tilfar til vega.

Hetta verður gjørt fyri at royna at fáa enda á at margfalda. Fyri tað fyrsta er tað ikki lógligt, og fyri tað næsta er tað ópraktiskt.

Ætlanin er eisini at halda fram við kórleiðaraskeiðum, soleiðis at sjónarringurin hjá føroyskum kórleiðarum víðkast. Eisini liggja onkrar ætlanir frammi um at gera eina nýggja føroyska kórbók við nýggjari sangum, sum kanska eru eitt sindur popp-merktir, men vísa seg at vera slitgóð.

– Avmarkað er, hvat vit kunnu gera. Við kórleiðaraskeiðum og slíkum er tað um reppið at vit klára okkum fíggjarliga, sigur Ólavur Hátún at enda.




# Enskt skeið á University of Aberdeen

1, 2 ella 4 vikur




**Intensive Course in Developing Language and Communication Skills**

| Tíðarskeið | Førleiki | | |
|---|---|---|---|
| 4. - 29. mars | Undir miðal (Early Intermediate) | | |
| 5. apr - 3. mai | Undir miðal og miðal (Early Intermediate og Intermediate) | | |
| 6. mai - 31. mai | Undir miðal og miðal (Early Intermediate og Intermediate) | | |
| 3. jun. - 28. jun. | Miðal (Intermediate) | | |
| 8. jul. - 16.aug. | Miðal og yvir miðal (Intermediate og Upper Intermediate) | | |
| **Skeið** | **1 vika** | **2 vikur** | **4 vikur** |
| Fyri hvønn | 6.993,- | 11.787,- | 20.840,- |

**Íroknað prísin er:** Flogferð t/rt, skeið (20 tímar undirvísing um vikuna) skeiðtilfar. Innivist á Kings Hall, einkult kamar við bað og morgunmati og ferðaavgjald. Kings Hall er eitt Conference Centre við gistingarmøguleikum, bert fáa minuttir frá universitetinum.

Eisini er møguligt at fáa skraddaraseymað skeið eftir ynski. Hesi skeið eru ikki tíðarmerkt og kunnu gerast til einhvørja tíð um pláss er, og eru tey serliga væl egnað til fyritøkur við serligum málsligum krøvum. Les meira á www.atlantic.fo.

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Løgmaður fekk kalda móttøku

**Fyrsta royndin hjá løgmanni og Óla Holm at koma upp í trætuna um skúlan á Trøllanesi fekk kalda móttøku í Mikladali, men løgmaður sigur, at tilboðið um semingsroynd stendur við**

TRØLLANES-TRÆTAN
*Eyðun Klakstein*

**Kalsoy:** Løgmaður fekk onga góða móttøku, tá hann bjóðaði sær at koma upp í at loysa trætuna um skúlan á Trøllanesi.

Ein av limunum í bygdaráðnum í Mikladali segði í gjár við Sosialin, at tað nyttar einki, at løgmaður ella landsstýrismaðurin við skúlamálum komu norður, tí um foreldrini á Trøllanesi halda fast um síni krav, so er eingin loysn í málinum.

Tað vil siga tað sama, sum at bygdaráðið stendur fast við sína støðu um, at skúlin á Trøllanesi verður ikki tikin í nýtslu aftur, soleiðis sum foreldrini á Trøllanesi vilja.



*- Tilboðið um, at eg og Óli Holm kunnu gera eina ítøkiliga roynd at loysa málið, stendur við, og eg havi ikki mist mótið um, at vit kunnu gera okkurt fyri at finna eina loysn, sigur Anfinn Kallsberg*

Løgmaður hevur verið í sambandi við bygdaráðið í Mikladali, men hann fekk somu boðini, sum Sosialurin endurgav í gjár.

– Fáa vit ikki ein dialog í lag, er tað avmarkað, hvat vit kunnu gera. Tað er bygdaráðið og skúlanevndin, sum hevur avgerðarrættin, sigur Anfinn Kallsberg.

## Tilboðið stendur við

Løgmaður hevur tó ikki givið upp enn, hóast fyrsta royndin miseydnaðist, áðrenn hon kom í gongd.

– Tilboðið um, at eg og Óli Holm kunnu gera eina ítøkiliga roynd at loysa málið, stendur við, og eg havi ikki mist mótið um, at vit kunnu gera okkurt fyri at finna eina loysn, sigur Anfinn Kallsberg.

– Men skalt tú loysa eitt stríð, mást tú verða til reiðar at tosa um, hvussu hetta stríð kann loysast. Tí er tað trupult at gera nakað, um bygdaráðið í Mikladali ikki vil vera við til at tosa um eina møguliga loysn.

Foreldrini á Trøllanesi, sum ikki vilja senda børn síni í skúla í Mikladali, fyrr enn skúlin á Trøllanesi eisini verður partur av undirvísingini, vilja fegin hava umboð fyri landsstýrið at koma uppí málið.

Bygdaráðið heldur seg hinvegin hava tikið ta avgerð, sum tað heldur vera best fyri kommununa, og hendan avgerð er endalig.

Formaðurin í Vinnunevndini:

# Torført at stuðla rækjuflotanum

**– Tað er vandi fyri, at almennur stuðul til rækjuflotan bara útsetir pínuna eitt sindur, sigur Heini O. Heinesen, formaður í Vinnunevndini hjá løgtinginum**

RÆKJUKREPPA
*Eyðun Klakstein*



*– Vit hava havt ringar royndir av kreppuloysnum áður, tí tað hevur víst seg, at almennur stuðul bara hevur útsett pínuna, sigur Heini O. Heinesen, formaður í Vinnunevndini*

– Er støðan á rækjumarknaðinum seinastu tíðina varðandi, so nyttar tað einki at lata rækjuflotanum stuðul, tí so snýr tað seg bara um at útseta pínuna hjá teimum eitt sindur.

Tað sigur formaðurin í Vinnunevndini hjá løgtinginum, Heini O. Heinesen.

– Tað er ikki gott tekin, at rækjuskip, sum fyri kortum vóru sanerað fyri nógvar milliónir, nú koma aftur til landið at biða um pengar.

## Trupul støða

Heini O. Heinesen heldur, at um talan er um prísfall í eina avmarkað tíð, so er støðan onnur, enn um talan er um eina varðandi støðu.

– Hetta málið er sera trupult at viðgera politiskt. Um vit skulu stuðla rækjuflotanum, hvat hendir so, tá alivinnan fær trupulleikar, skulu vit so aftur at stuðla tá.

– Vit hava havt ringar royndir av kreppuloysnum áður, tí tað hevur víst seg, at almennur stuðul bara hevur útsett pínuna. Alt fór á heysin fyri tað. Og tá tað verður sagt, at brent barn ræðist eld, so er tað trupult at fara lata stuðul rækjuflotan, sigur Heini O. Heinesen.

Hann sigur seg ikki hava neyðugu upplýsingarnar í málinum til at hava eina avgjørda støðu, men hann heldur, at tað er ivasamt, um tað er rætt við almennum stuðli til rækjuflotan.

# Rækjuvirkið á Oyri í somu vandastøðu

**– Verða føroysku rækjuskipini løgd, so mugu vit eisini gevast við okkara framleiðslu, tí so hava vit onga rávøru, sigur stjórin á Rækjuvirkinum á Oyri. Framleiðslan hjá virkinum er bundin at føroyskum rækjufiskiskapi**

RÆKJUKREPPA
*Eyðun Klakstein*



*Framleiðslan hjá teimum 80 fólkunum á Rækjuvirkinum á Oyri er bundin tætt at føroysku rækjuskipini. Um hesi skip verða løgd, so missir virkið sína rávøru og má gevast*

Tað fær álvarsamar avleiðingar fyri Rækjuvirkið á Oyri, um føroysk rækjuskip verða løgd.

– Vit keypa alla okkara rávøru frá føroyskum rækjuskipum, og tað er tað einasta, sum vit kunnu gera, tá vit flyta út til ES. Verða føroysku rækjuskipini løgd, ja, so mugu vit eisini gevast við okkara framleiðslu, sigur Sofus Poulsen, stjóri á virkinum.

Høvuðsframleiðslan hjá Rækjuvirkinum eru pilkaðar rækjur, sum verða seldar til Bretlands. Rávøran kemur frá føroyskum skipum, og tá slepst undan serligum tolli á vøruni. Skal Rækjuvirki keypa rávøru úr útlandinum, so verður ein tollur upp á 20 prosent lagdur á tí lidnu vøruna, og tá hevur ongan kjans at kappast á bretska marknaðinum.

– Tí er framleiðslan hjá teimum 80 fólkunum her á virkinum bundin at føroysku rækjuskipunum, sigur Sofus Poulsen.

## Vánalig útlit

Prísurin á øllum sløgum av rækjum er lágur, og tá tað snýr seg um útflutningin hjá Rækjuvirkinum á Oyri, hava tey ongantíð áður fingið so lítið fyri vøruna.

Hetta merkir, at virkið kann lata nógv minni fyri rávøruna frá skipunum.

– Prísurin á okkara vøru fór niður í februar mánaði í fjør, og hann er ongantíð komin uppaftur. Talan er um eina niðurgongd upp á 15 prosent. Vit hava tó framleitt sum vanligt síðani, men tað er púra greit, at verða føroysku rækjuskipini løgd, so hava vit ongan møguleika at halda fram, sigur Sofus Poulsen.

– Vit høvdu vónað at prísurin fór at koma upp aftur um ársskiftið, men tað hevur ikki verið so, og útlit eru ikki fyri, at prísurin fer at hækka komandi mánaðirnar, sigur hann.

Tað arbeiða um 80 fólk á Rækjuvirkinum á Oyri.


